tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Álit og kanningar

Oddagrein

Grundgevingin hjá Tjóðveldisflokkinum at fáa Signar á Brúnni úr landsstýrinum var at fáa embætisførslu hansara kannaða, so álit framvegis kann vera á flokkinum og landsstýrinum.

Flokkurin hevur neyvan nakað at missa, men helst nógv at vinna við at halda »moralin« í hásæti, tí hetta er jú nakað, vit hava saknað áður. Øll hava ásannað, at í Føroyum lat alt seg gera, og ongar misgerðir - ella vantandi gerðir - fingu avleiðingar. Men sjálvandi kunnu spurnartekin setast við hetta einstaka málið, sum eisini er gjørt á hesum stað seinastu dagarnar, tí ivamál er um okkurt av punktunum í niðurstøðuni hjá løgtingsgrannskoðarunum.

So er spurningurin um álitið á landsstýrið. Høgni Hoydal sigur jú, at kanningin verður gjørd fyri, at vit borgarar eisini skulu hava álit á landsstýrinum!

Landsstýrið hevur ikki sitið í tvey ár enn, men nógv spurnartekin kunnu setast við arbeiði og mannagongdir hjá landsstýrinum.

Vit kunnu taka okkurt hissini mál úr rúgvuni. T. d. ta niðrandi mannagongdina, tá Henning Jacobsen varð kroystur úr starvi uttan nakra veruliga grundgeving. Hetta málið skapti ikki álit á landsstýrið, men hví er eingin verulig kanning gjørd? Tann kanningin, sum miðfyrisitingin gjørdi, var jú bara eitt eiti?

Eitt heitt mál fyri tveimum mánaðum síðani var mannagongdin í samband við sparingar og uppsagnir á landsjúkrahúsinum. Tá var sjúkrahússtjórin koyrdur, tí hann boðaði frá, at hann setti sparingar í verk, sum vóru neyðugar fyri at kunna halda fíggjarætlanina. Hann upplýsti aftaná, at aðalstjórin var kunnaður um ætlanirnar, og at hann hevði fingið vissu fyri, at landsstýriskvinnan var kunnað. Men hann var offraður, tá landsstýriskvinnan fekk kaldar føtur. Hví verður tað ikki kannað, um sjúkrahússtjórin handlaði í góðari trúgv - tí hann trúði, at landsstýriskvinnan var vitandi um ætlanirnar.

Í seinastuni er ivi sáddur, um landsstýrismaður hevur hjálpt fyritøku at selja tey skip við at lata teimum eina størri kvotu, so tey vóru betri søluvøra. Fólk innan fiskivinnan ivast ikki í, at »lusk« er farið fram. Hevur føroyski almenningurin ikki krav um at fáa at vita, um landsstýrismaðurin hevur havt ein fingur við í spælinum.

Útmerkað at fáa mál og embætisførslur kannað. Men um almenningurin skal fáa álit á sitandi landsstýri, skulu fleiri mál kannast!

Sosialurin

Viðmerking:

Er fólkakúlalógin nakað verd, tá enn ikki myndugleikarnir taka hana í álvara!

Yvirlýsing 29. mars 2000: At seta Signar á Brúnni, landsstýrismannin í undirvísingar- og mentamálum, frá fyri sjónvarpsmálið, er so eitt, meðan stórmálið: fólkaskúlin lættliga verður lagdur til viks, má tulkast sum stór líkasæla frá landsstýrinum.

Í Degi og viku í gjárkvøldið varð upplýst frá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, at tað hevur skund at fáa gongd aftur á samráðingarnar.

Hin viljaleysi og stívrendi samráðingarháttur fíggjarmálastýrisins og teirra vreingjan av tølum til almenningin og serliga hetta seinna ger, at Føroya Lærarafelag við hesum krevur, at fólkini í fíggjarmálastýrinum koma við nýggjum, reellum og realistiskum hugburði til samráðingarborðið.

Føroya Lærarafelag førkaði seg langt fyri at fáa eina semju í lag, meðan fíggjarmálastýrið ikki flutti seg ein tumma.

Karsten Hansen! – Melda so út við nøkrum ítøkiligum!

Føroya Lærarafelag
Elsa Birgitta P. Petersen

Báran eydnuhjól

Í samband við at Báran skipar fyri stórum eydnuhjóli norðuri á Fossánesi nú leygarkvøldið frá kl. 20, verður nógv gott at vinna, eitt nú Playstation, lomb, stereoanlegg, før. kjøt, fartelefonir og jau, jau ferðir frá Atlantic Airways til Íslands.

Í samband við tiltaki verður eisini ein lutaseðil seldur, ið kostar einans 5 kr, á lutaseðlinum verður 10 vinningar, harav verður eitt lamb, og ein jau, jau ferð frá Atlantic Airways til Íslands, seðilin verður dirgin, tá eydnuhjólið endar leygarkvøldið kl. 24.00. Nevndin í Báruni hevur samtykt, at partur av yvirskotinum skal fara til børnini í Ukraina sum koma til Føroyar á vitjan í summar, nevndin heldur at hetta er eitt gott tiltak, sum nakrir føroyingar gera fyri hesi børn og hevur tí samtykt at stuðla teimum.

Oceanic days framsýning

Í sambandi við frumframførsluna av symfoniini **Oceanic days** eftir Sunleif Rasmussen, skipar Landsbókasavnið fyri lítlari framsýning í Norðurlandahúsinum.

Tónaksaldið Sunleif Rasmussen hevur av sínum eintingum síðan 1990 latið Landsbókasavninum í varðveitslu frumritini til umleið 30 tónleikaverk. Millum hesi verkini er eisini frumritið til symfoniina, ið verður at síggja á framsýningini.

Framsýningin verður at síggja í døgunum 28. mars til 3. apríl.

Beinta Eliasen hevur latið upp handilin Millennium í gomlu handilshølunum hjá Jóan Jakku í Vágsbotni
Mynd: Jens Kristian Vang

Millennium í Vágsbotni í Havn

Leygardagin lat upp nýggju handil í Vágsbotni í Havn - í húsunum, har Jóan Jakku, skómakarin hevði skósølu, ella har, sum Hous of Lei hevur hildið til seinastu tíðina.

Tað er Beinta Eliassen, sum eigur nýggja handilin, ið nevndist Millennium. Talan er um ein mótahandil við klæðum til konufólk, bæði ung og eldri.

Umframt Millennium er hesini ullahandilin Sirri í húsunum í Vágsbotni. Meðan tann handilin húsast á aðru hædd, húsast Millennium á fyrsta hædd beint inn frá vegnum.

Av klæðunum, handilin hevur at bjóða er m. a. norska merkið Bla Bla, men ætlanin er eisini at fáa fatur á øðrum merkjum.

Ógvusligur harðskapur í Klaksvík

Leygarmorgunin varð ein maður, ið friðarliga spákaði á vegnum í Klaksvík, brádliga álopin og bukaður av

JOHN JOHANNESSEN

Um tvey tíðina leygarmorgunin vaknaðu fólk við Klaksvíksvegin í Klaksvík av, at ein maður rópti neyðarróp onkustaðni nærhendis.

Talan var um ein mann, ið friðarliga gekk á fram við vegnum og heintaði fløskur, ið slongdar vóru úr bilum eftir kvøldsins veitsluhald. Maðurin kendi seg eltan av tveimum ungum monnum, og fór hann at rópa neyðarróp, tá hann legi til merkis, at menninir brádliga tóku sær renningaferð til at leggja á hann.

Maðurin, sum í Klaksvík er kendur fyri at vera eitt friðardýr, varð bukaður av, av teimum báðum ungu monnunum. Teir slógu hann fyrst til hann fall, og síðani herjaðu teir á at sparka mannin.

Fólk, sum vóru vaknað av neyðarrópunum sóu tilburðin og ringdu eftir løgregluni. Men áðrenn løgreglan kom á staðið hildu menninir til beins. Teir báðir sóu nevniliga, at fólk vóru vaknað og høvdu tendrað ljós.

Ungu menninir vórðu handtiknir leygardagin. Fleiri vitni sóu tilburðin so mikið væl, at til bar at navngeva brotsmenninar. Løgreglan hevur avhoyrt bæði vinti og brotsmenn, og kemur málið fyri í rættinum í næstum.

Sambært løgregluni í Klaksvík, er talan um eitt ógvusligt harðsskapsmál. Sosialurin skilir eisini, at teir báðir ungu menninir fyrr hava elt mannin, teir seinasta leygardag bukaðu av.

Leygardagin fara klaksvíkingar at hátíðarhalda meistaraskapin hjá Stjørnuni

Gera nógv burtur úr í Klaksvík

Tað verður sannur veitslurómur í Klaksvík, tá Stjørnan leygardagin fer at hátíðarhalda meistaraskapin

Í samband við at kvinnurnar hja Stjørnuni eru føroyameistarar, verður nógv gjørt burtur úr, tá seinasti dysturin hjá liðnum verður í KÍhøllini leygardagin.

Í samband við dystin spælir Klaksvíkar Hornorkestur, røðir verða hildnar og eisini verða heiðursmerkini handað.

Bakaríið hjá Símun fer eisini at hava framsýning av lagkøgum.

Eisini verður møguligt hjá áskoðarunum at fáa kaffi og lagkøkur frá Símun. Fyri børnini verður fiskidammur, og tey fáa sodavatn og góðgæti. Sangur og undirhald verður við Niclas Hera Jákupsson, Jógvan Hansen og Arnfríð Lützen.

Gospel konsert

Leygarkvøldið klokkan 22.00 verður konsert í KÍhøllini við kenda gospelbólkinum I'am og Torkil Mørkøre fer eisini luttaka. Hendan kosertin verður í umleið tveir tímar. Kostnaður er 50 kr.

Um kvøldið verður veitsla á Tekniska Skúla og seinni verður dansur, har kendi bólkurin TAXI fer at spæla. Umframt TAXI luttaka limir úr Dynamit og Arja.

Í løtuni eru atgongumerki til veitsluna til sølu á Shell Quick Service, og tey kunnu keypast til klokkan 19.00 í kvøld. Kostnaðurin fyri bæði veitslu og dans er 200 krónur.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

Opið hús
hjá
Kaj Andreasen & Co

Nú farið er inní eitt nýtt áratúsund, er tíðin komin til framvísing av nýggjari vøru. Í samband við vitjan frá Hünnebeck frá 2. til 8. apríl, verður opið hús, har møguleiki verður at síggja:

- *Bosta stillads*
- *Opal Alu. stillads*
- *Rasto forskalling*
- *Tekko forskalling*
- *umframt annað*

Væntandi verður eisini møguleiki fyri at síggja eina 40" innrættaða bingju við Bosta - stillads klár til flutning frá byggiplássi til byggipláss.

Komið tískil til

Opið hús 6. apríl 2000

kl. 13.00 – 19.00 hjá
Kaj Andreasen & Co á Sandvíkarhjalla.
Okkurt verður til matna.

Brian Nissen frá Hünnebeck Danmark er at hitta frá 2. til 8. apríl á Hotel Hafnia,

tlf. 313233 ella á biltelefon nr. +45 40567547

Vit síggjast

Kaj Andreasen & Co
Hünnebeck Danmark A/S